## KJARNUVIRÐI

### Vit eru nærløgd

Vit útinna okkara yrki av einlistum við virðing fyri starvi og samstarvi, sum kveikir besta tænastuandan og tænir øllum áhugamálum, sum Nærverkið varðar av.

### Vit eru framsøkin

Framsøknin skal altíð dystast við vanahugsanina.Tráanin eftir at betra og hugsa nýtt skapar framrák og flytir mørk.

### Vit samskifta virðiliga

Øll tænasta og alt samstarv er grundað á samskifti partanna millum. Tolsemi, innlivan og víðfevnd menniskjafatan eru fortreytir fyri tí virðiliga og smidliga samskifti, ið krevst til góðan samstarvsanda og samskiftissið.

NÆRVERKIÐ
Í góðum hondum

ANNIJANNI

NÆRVERKIÐ
Í góðum hondum

# Í GÓÐUM HONDUM

SETNINGUR, HUGSJÓN OG KJARNUVIRÐI NÆRVERKSINS

## SETNINGUR – Hví eru vit til

- NÆRVERKIÐ veitir tænastur til børn, ung, vaksin og eldri fólk við serligum tørvi, sum búgva heima, á stovni ella á sambýlum
- Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í førleika og tørvi hjá tí einstaka
- Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika

## HUGSJÓN – Hvørjum stremba vit eftir

- NÆRVERKIÐ veitir fyrsta floks nærtænastur, ið skapa einstaklingi, familju og samfelagi tryggleika
- Góður yrkisligur og menniskjaligur kunnleiki tryggjar miðvíst, at borgarin er í góðum hondum
- Nærverkið slóðar fyri, loyvir nýggjum royndum og hugsanum og lagar seg smidliga eftir teimum

### Nærverkið veitir fyrsta floks nærtænastur, ið skapa einstaklingi, familju og samfelagi tryggleika

Í øllum okkara verki stremba vit eftir, at tænastan er fyrsta floks. Hesin setningur liggur fremst í huga, sama hvør uppgávan er.

Nærverkið tryggjar við sínum tænastum møguleika, at fólk við serligum tørvi og teirra avvarðandi kunna liva og virka í samfelagnum.

Nærverkið leggur seg eftir at vera millum tey fremstu við vælferðartænastum sammett við onnur lond.

### Góður yrkisligur og menniskjaligur kunnleiki tryggjar miðvíst, at borgarin er í góðum hondum

At borgarin er í góðum hondum merkir, at hann skal vera tryggur og hava álit á, at starvsfólkini gera alt tað, ið miðvíst stuðlar honum at klára seg sjálvan. Tað verður gjørt við virðing fyri honum og hansara sjálvsavgerðarrætti. Í góðum samstarvi bæði við borgaran sjálvan og avvarðandi verður tænastan lagað eftir tí einstaka.

Yrkisligur kunnleiki, starvslag og samstarv eru í hásæti, starvsfólkini eru ábyrgdarfull, nærløgd og nærverandi og seta sær miðvíst hægri mál.

### Nærverkið slóðar fyri, loyvir nýggjum royndum og hugsanum og lagar seg smidliga eftir teimum

Nýhugsan, samstarv og íblástur uttan- og innaneftir eru teir natúrligu tættirnir, sum skapa framrák í Nærverkinum. Tá ið royndir og hugsanir verða framdar í verki, gera vit mun og lyfta í felag Nærverkið fram.